**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 30. juni 2014, kl. $17^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Øssur Christiansen, Malan Stórá, Herit Magnussen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Durita á Heygum boðað frá, at henni berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hennara stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 23. juni 2014 og játtaði at møta á fundinum.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Øssur Christiansen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 89**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um uppskot til samstarvsavtalu um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
J.nr. 00.17.20-A00-1-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. juni 2014 uppskot til samstarvsavtalu um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
Nevnin mælir bygdarráðnum til at taka undir við uppskoti um samstarvsavtalu um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

**Viðv. 89**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 90**
Tilmæli frá borgarstjóranum um samstarv millum Sunda, Eiðis, Kvívíkar og Vestmanna kommunur um felags barnaverndartænastu sambært § 4 stk. 1, 4, 5 og § 6 stk. 2 í Barnaverndarlógini.

**Viðv. 90**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 91**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Niels Th. Pedersen um sundurbýti av matr.nr. 59e og 290 um broyting av parti av matr. nr. 290 til sethúsaøki.

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 18. juni 2014 umsókn frá Niels Th. Pedersen um sundurbýti av matr.nr. 59e og 290 um broyting av parti av matr. nr. 290 til sethúsaøki.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 91**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 92**
Tilmæli frá Fígjarnevndini um umsókn um frá VÍF um stuðul til Fjarðastevnuna 2014.
J.nr. 20.15.00-Ø10-...-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 18. juni umsókn frá VÍF um stuðul til Fjarðastevnuna 2014.
Søkt verður um 40.000 kr í stuðli. Harumframt søkir VÍF um arbeiðshjálp í sambandi við stevnuna – m.a at seta flaggstengur upp, heingja ljósketur upp o.a.t.
J.nr. 20.00.00-Ø40-...-14 Sí eisini j.nr. 2009-430

Nevndin mælir til at stuðla VÍF í sambandi við Fjarðastevnuna 2014 við kr. 20.000.

**Viðv. 92**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00